Grønland ger vart við seg í ES

Umboð fyri grønlendska heimastýrið og vinnulívið hava í dag verið í Bruxelles. Millum annað skuldu tey siga frá, hvat grønlendska heimastýrið heldur um uppskotið hjá ES-nevndini at banna ES-londunum at innflyta kópaskinn. Veiðimannafelagið KNAPK hevur gjørt vart við, at eitt innflutningsforboð hjá ES er ein álvarssom hóttan ímóti grønlendskari mentan. Finn Karlsen, landsstýrismaður, segði undan fundinum í dag, at han ætlaði sær at kunna mótpartin um, hvussu týðandi kópaveiði er fyri grønlendska samfelagið.

Selma Ellingsgaard góðtekur ikki tað, sum fer fram í Kringvarpinum og hon ger púra greitt, at seinasta orðið er ikki sagt enn

Átta fólk uppsøgd í Kringvarpinum

Í gjár fingu átta starvsfólk í Kringvarpinum endaliga at vita, at tey eru søgd úr starvi og royndin hjá Starvsmannafelagnum at fáa Kringvarpið at taka uppsagnirnar aftur er sostatt miseydnað

KRINGVARPIÐ
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað er nú greitt, at átta fólk í Kringvarpinum eru søgd úr starvi.

Ætlanin hevur verið at siga tey upp síðani nakað fyri jól, men í gjár fingu tey so endalig boð um, at tey eru søgd upp.

Eftir at tey fingu ætlanarskriv um uppsøgnina í desember, hava tey havt høvi til at gera sínar viðmerkingar.

Tað gjørdu tey í farnu viku og síðani hevur leiðslan í Kringvarpinum viðgjørt svarini.

Men tað broytti ikki støðuna og í gjár hava tey átta fólkini so fingið endaliga at vita, at tey eru søgd upp.

Miseydnaðist

Sjey av hesum fólkunum eru limir í Starvsmannafelagnum og felagið royndi til tað síðsta at fáa Kringvarpið at taka uppsagnirnar aftur og heldur at royna aðrar leiðir, eitt nú at bjóða fólki at arbeiða parttíð og at brúka ásetingarnar í sáttmálanum um eldrapolitikk, ella at flyta starvsfólk ímillum deildir.

Starvsmannafelagið heldur sostatt ikki, at Kringvarpið hevur gjørt nokk fyri at sleppa undan uppsagnunum.

Grundgevingin fyri at siga fólkið upp, er at Kringvarpið noyðist at spara. Men samstundis sum átta fólk eru søgd upp, eru onnur fólk sett í starv.

- Starvsmannafelagið heldur sostatt ikki, at haldgott grundarlag er fyri uppsagnunum og royndi tí at fáa kringvarpið at taka tær aftur, men vit mugu nú staðfesta, at tað hevur verið til fánýtis.

Ógilda starvssetan

Umframt at Starvsmannafelagið krevur, at uppsagnirnar verða tiknar aftir, krevur felagið eisini, at starvssetanin, har ein journalistur er settur at byrja um eina góða viku, verður ógildað, men heldur ikki tað góðtekur Kringvarpið.

Tá ið hetta nýggja fólkið varð sett, varð starvið bara lýst á heimasíðuni hjá Kringvarpinum og tað heldur Starvsmannafelagið ikki er nøktandi.

- Treytin er, at øll størv skulu lýsast leys og tí halda vit, at tað er sáttmálabrot, tá ið eitt starv bara er lýst á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

- Tað er eisini sáttmálabrot og brot á almenna setanarpolitikkin, at álitisfólkið á stovninum ikki hevur fingið málið til ummælis og skal vera við í setanarbólkinum

Umframt hendan eina journalistin, hevur Kringvarpið seinastu mánaðirnar eisini sett aðrar journalistar í starv og tað hendi, uttan at størv vóru lýst leys.

Enn er óvist um Kringvarpið eisini fer at krevja hesar starvssetanirnar afturtiknar.

- Tað veldst um niðurstøðuna hjá løgfrøðinginum, sigur Selma Ellingsgaard.

Selma skelkað av uppsagnum

Starvsmannafelagið fer nú at kæra uppsagnirnar í Kringvarpinum, tí tað verður framvegis mett, at grundarlag er fyri teimum

KRINGVARPIÐ
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Seinasta orðið um uppsagnirnar í Kringvarpinum, er ikki sagt enn.

Tað staðfestir Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, eru uppsagnirnar, sum hava ligið í kortinum í Kringvarpinum, nú endaliga settar í verk og í gjár fingu átta starvsfólk í Kringvarpinum uppsøgn sendandi í postinum.

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, er skelkað av mannagongdini, tí hon metir framvegis, at uppsagnirnar eru framdar, uttan at haldgott grundarlag er fyri teimum.

- Orsøkin til uppsagnirnar eru sparingar. Men eftir okkara tykki, samsvarar tað ikki við veruleikan, tí samstundis sum fólk eru søgd upp, verða onnur sett í starv.

- Serliga tann veruleiki, at Kringvarpið hevur sett onnur fólk í starv, samstundis sum hesi átta eru søgd upp, hevur styrkt Starvsmannagelagið í trúnni upp á, at ov lítið er gjørt fyri at sleppa undan uppsagnunum og at veruliga grundarlagið undir teimum kann ikki vera sparingsar, sigur Selma Ellingsgaard.

Kringvarpið hevur heldur ikki gjørt nóg mikið fyri at sleppa undan uppsagnum við at brúka ásetingarnar í sáttmálanum um eldrapolitikk ella við at bjóða starvsfólki at arbeiða niðursetta tíð.

Starvsmannafelagið ráðførir seg nú við løgfrøðing fyri at vita, hvussu farast skal fram hereftir.

Síðsta orðið ikki sagt

Tí er tað greitt, at síðsta orðið er ikki sagt í hesum máli enn og at Starvsmannafelagið fer víðari við málinum. Ein møguleiki er at stevna Kringvarpinum ella at leggja uppsagnirnar fyri Løgtingsins Umboðsmann.

- Vit fara undir øllum umstøðum at kæra uppsagnirnar.

Spurningurin er bara, hvagar kæran skal sendast.

- Kringvarpið sigur, at kærast kann til mentamálaráðið. Men mentamálaráðið, sum vit eisini hava samskift við, sigur, at kærast skal fyrst til stýrið fyri Kringvarpið og fæst ikki viðhald har, kann kærast til mentamálaráðið.

- Tað mugu vit fyrst fáa greiði á. Tað einasta, sum er greitt, er, at tað verður kært.

Hjálpir tað heldur ikki, verður farið víðari við málinum.

- Tá kann talan kann verða um at stevna Kringvarpinum, men talan kann eisini verða um at klaga til Løgtingsins Umboðsmann, tað veldst um niðurstøðuna hjá løgfrøðinginum, sigur Selma Ellingsgaard.

Hinvegin hevur Kringvarpið tvíhildið um, at allar mannagongdir eru hildnar út í æsir.